## HEILSANIR



**Hey góða Fríða**
Vit í Lamba og omma og abbi ynskja tær tillukku við føðingardegnum, Jórun fær eisini eina heilsan.
**Vinarlig heilsan frá okkum**



**Góði Ronni**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 25. mai.
**Allarbestu heilsanir Steffan, Teitur, mamma og babba**



**Góða Birita systir og dóttir**
Hjartaliga tillukku við 25 árunum. Alt tað besta ynskja vit tær. Vit elska teg.
**Torgunn, Ingmar, mamma og babba**



**Góða fitta Birita**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 26. mai. Alt tað besta.
**Ynskir lítladiddan**



**Góða fitta Karina**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum, ið var 22. mai. Vit elska teg.
**Ynskja omma og abbi í Sýrugøtu**



**Góða elskaða Karina**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum ið var 22. mai. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja vit í Vestmanna, Hallur**



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag. Tú ert so wellir at spæla við.
**Ísak**



**Góða elskaða Birita mostir, systir og svigarinna**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum. Takk fyri alt, tú er fyri okkum.
**Robert, mamma og babba**



**Góða Sólrun gumma**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum. Takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Ynskir Sámal**



**Góða elskaða Anita**
Hjartaliga tillukku og gleði á tínum 12 ára degi, sum var tann 16. mai og Guds signing við framtíð tíni. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og pabba**



**Allarbesta Anita!**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum, ið var 16. mai. Gud vælsigni teg og takk fyri at tú ert so góð við meg.
**Bestu heilsanir systir tín**





**Vår kjære snille Paula**
Vi vil gratulere så mye med 10 års dagen din. Håper du får en koselig dag.
**De bedste hilsener fra bestemor og Siri**

**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



## HEILSANIR





**Góða fitta Paula**
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum 25. mai. Jesus pápi veri hjá tær.
**Bestu heilsanir frá Olafi, Ragnu, mammu og babba**



Eg og foreldur míni takka øllum, sum á ýmiskan hátt hjálptu til og gjørdu dagin so hugnaligan á mínum fermingardegi 13. apríl. Takk fyri gávur og vitjanir.
**Heilsan Guðrun Ziska**



Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ýmiskan hátt gleddu meg á fermingardegnum tann 06.10.02.
**Heilsan Kjartan Jørgensen, Miðvágur**



**Góða Karina**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum ið var 22. mai. Nú ert tú blivin stór. Jesus pápi verið hjá tær.
**Ynskja mostir og Andreas**



**Góði elskaði sonur og beiggi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum tann 24. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Kærar heilsanir mamma, pabba og Kristin Oluf**



**Hey góði John**
Her ært tú ein seinkaða heilsan. Tillukku við 20 ára degnum
**Heilsan eg**
P. S. Eisini ein heilsan til Sigmund, sum er 21 ára gamal



Jeg takker alle dem som viste mig opmærksomhed på konfirmationsdagen den 04.05.03.
**Hilsen Martin Larsson Andersen, Holstebro, Danmark**

## TILTØK

**Felagið Tórshavn**
Sunnudagin 25. mai verður kommunumark gingið: Útsetti parturin Vatnsdalsegg-Sornfelli-Stígaskarð og parturin Skælingsfjall eftir røðini. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Gingið verður tilsamans í uml. 6 tímar. Túrurin er brattur í støðum. Tað ber til at ganga part av túrinum. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 26. mai*
Sólrunn Christiansen lesur upp stuttsøgu. Sangur.
*Mikudagin 28. mai*
Vit fara ein dagstúr til Skálavíkar, har Palli Dalsgaard sigur frá søguligum støðum. Aftaná verður farið í Ísansgarð, har drekkamuður verður at fáa. Farið verður úr tilhaldinum umleið kl. 14.00 Kostnaður fyri túrin 50,00 kr.
Túrurin til Elduvíkar er útsettur vegna verkfall. Hesin túrurin verður ístaðin 18. juni. Neyvari skrá verður lýst seinni.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 26. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum.
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 27. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 28. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 29. mai*
Kristi himmalsferðardagur – stongt
*Fríggjadagin 30. mai:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## KONFIRMATIÓN

Sunnudagin 25. mai konfirmerast í Gilleleje kirkju, Maria Wichmann, dóttir Lillian Tórfinnsdóttir Wichmann av Skála.

29. mai konfirmerast Vanja Davidsen, dóttir Peddy Davidsen í Søborg kirke. Adr.: Carl Møllers Allé 10, 2860 Søborg.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 14. juni kl. 16.00 giftast í Frelsunarherinum í Havn Jensia Højgaard Petersen, Tórshavn og Leon Svenningson Kjærbæk, Vágur. Brúdleypið verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitslu kunnu ringja á tlf. 315278, 269445 og 373989 innan 4. juni og tekna seg.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Jutta Augustinussen, Vágur og Sigmund Olsen, Hvalba. Veitslan verður í Roynhøllini í Hvalba kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 373073 ella 375222 ella 0045 76253517 í seinasta lagi tann 1. juli.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Anita Simonsen og Herálv Jensen av Sandi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 361920, 361111, 361484 í seinasta lagi 13. juni.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Hósvíkar kirkju Súsanna Kelduberg, Nólsoy og Hans Andrias Joensen, Hósvík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 318541, 315638 ella 422102 innan 14. juni.

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 24.05. kl. 20⁰⁰
Leygardagin 24.05. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 25.05. kl. 19³⁰
Sunnudagin 25.05. kl. 22¹⁵




Leygardagin 24.05. kl. 18³⁰
Leygardagin 24.05. kl. 23³⁰
Sunnudagin 25.05. kl. 18⁰⁰
Sunnudagin 25.05. kl. 23⁰⁰




Leygardagin 24.05. kl. 21⁰⁰
Sunnudagin 25.05. kl. 20³⁰

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
**Mikudagin 28.05.**

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**